

## Halgidagslógin stendur ikki ovast

Við kongligari fyriskipan varð galdandi halgidagslóg í 1923 sett í gildi í Føroyum, og lógin er ikki broytt síðan. Á ólavsøku 2008 varð málsøkið yvirtikið, men einki røkist fyri, at lógin verður broytt. Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í kirkjumálum er greið yvir, at halgidagslógin er avoldað og ógjørlig at halda bæði hjá dansistøðum, handilslívi, samkomum og øðrum, men tann lógin er ikki tann, sum stendur oovast at fáa broytt, sigur hon. Aðrar kirkjulógir hava meira skund at gera, sigur hon. – Tað er ikki so einfalt at gera nýggja halgidagslóg, men vit kundu kanska sett fólk til at gjørt tilmæli til nýggja lóg, sigur Helena Dam á Neystabø.

*randi@sosialurin.fo*

## Grannar mistu svøvnin av Oasuni

Bæði langa fríggjadag og páskanátt ringdu grannar hjá Oasuni í Hoyvík og klagaðu um gang.

Langa fríggjadag fór politiið inn á gólvið í Oasuni og bað tey um at skrúva niður, men páskanátt var aftur galið. Politiið vitjaði aftur, men sambært einum granna gekk bara ein løta, so varð spælt líka hart aftur.

– Man skuldi trúð, at tað var eitt diskotek, men Oasan er ein samkoma, sum gjørdi, at vit alla høgtíðina ikki fingu sovið. Alt skalv, sigur grannin, ið bað politiið um hjálp at fáa svøvnnáðir.

Tá ið ein samkoma spælir harðan tónleik kemur tað ikki undir hugtakið "offentlig forlystelse", ið eftir halgidagslógini er forboðið um høgtíðina.

Men tað er kortini brot á halgidagslógina at halda gang halgidagar. Grein 1 í lógini sigur nevniliga:

Paa Folkekirkens Helligdage er alle Arbejdssysler i eller udenfor Huset, der ved den Larm, de medfører, eller iøvrigt ved den Maade, hvorpaa de foretages, forstyrrer Helligdagens Fred, forbudt.

Somuleiðis er tað brot á politiviðtøkurnar fyri Tórshavn, sigur Finn Ougaard, varafúti.

*randi@sosialurin.fo*

# Klaksvík vil hýsa Tjóðpallinum

**TJÓÐPALLUR FØROYA** Í stóru miðbýarætlanini fyri Klaksvík er pláss sett av til tjóðpall. Jenny C. Petersen, stjóri á Tjóðpalli Føroya veit ikki, hvussu hugsandi tað er at hava tjóðpall aðrastaðni enn í høvuðsstaðnum, men hon fegnast um, at klaksvíkingar eisini hugsa um tjóðpallin

Randi Jacobsen

Royndin Fríða nevnist stóra miðbýarætlanin, sum Archibald Black og Gunnar Nolsøe hava gjørt fyri Klaksvík.

Í hesi ætlan nevna teir, at pláss er sett av til tjóðpall.

– Tað hava vit gjørt, tí vit vita, at tjóðpallurin hevur ikki nóg góðar umstøður. Ymisk uppskot hava verið frammi í Havn um at byggja tjóðpall, men einki er hent. Vit vilja hava eitt mentanarhús við í ætlanina og halda okkum kunna bjóða tjóðpallinum bestu umstøður í húsinum út móti sjónum, sigur Archibald Black.

Hann heldur tað ongan týdning hava, um ein tjóðpallur hevur sæti í Havn ella í Klaksvík, tí tá ið Skálafjarðartunnilin kemur, fer tað at taka onga tíð at koyra millum Klaksvík og Havn.

Fólk hava tikið ymist ímóti uppskotinum um at byggja tjóðpall í Klaksvík. Summi hava sagt, at tað ber ikki til at hava tjóðpall aðrastaðni enn, onnur hava sagt, at tey mugu venja seg við tankan.

– Men eg havi eisini tosað við sjónleikarar í Havn, sum ikki hava hildið nakað galið vera við at hava tjóðpallin í Klaksvík, sigur Archibald Black.

### Klaksvík má hava pall

– Eg haldi tað vera frálíkt, at onkur hugsar um okkum, sigur Jenny C. Petersen, stjóri á Leikpalli Føroya.

Men hon ivast í, hvussu hugsandi tað er, at Tjóðpallur Føroya fær spildurnýtt hús. Tað er ein landsuppgáva, og hon hevur ikki varnast, at nakar peningur er settur av til tað.

Annars heldur Jenny C. Petersen, at tjóðpallurin eigur at vera í Havn. Ein høvuðsstaður sær tað sum eina æru at hava tjóðpallin.

– Og Tórshavnar kommuna hevur alla tíðina víst tjóðpallinum stóra vælvild. Hevði tað ikki verið, høvdu vit ongastaðni havt at húsast, sigur Jenny C. Petersen.

Uttan mun til, um tjóðpallurin fer til Klaksvíkar ella ikki, vónar Jenny C. Petersen, at klaksvíkingar gera álvara av at byggja mentanarhús, tí tað er neyðugt bæði fyri Klaksvíkar Sjónleikarfelag fyri norðingar sum heild, sigur hon.

*randi@sosialurin.fo*

**»** **Vit kunnu bjóða tjóðpallinum bestu umstøður**

ARCHIBALD BLACK

**BÝARHÚS**

*Í hesum húsinum á Sandinum í Klaksvík er pláss fyri Tjóðpalli Føroya*



**25. apríl**

**Klaksvíkar kommuna bjóðar øllum at gera viðmerkingar til nýggju miðbýarætlanina. Freistin er 25. apríl**